# Føroya søga til norðurlendingar

**Færingernes land er heitið á teirri nýggju bókini, sum Hans Jacob Debes hevur skrivað. Bókin er ætlað øðrum norðurlendingum, tá ið hesir vilja kunna seg um Føroyar og føroysk viðurskifti. Á samkomu leygardagin varð bókin løgd fram, og tað varð ikki spart við góðum orðum um bókina**



*Teir tríggir, fv. Steen A. Cold, Henrik Borberg og Kristian Hvidt, kundu ernir leggja bókina, Færingernes land, fram leygardagin.*

ÚTGÁVA

*Orð og myndir: Heri á Rógvi*

Land føroyinga ella rættari sagt Færingernes land er heitið á nýggju bókini hjá Hans Jacob Debes. Bókin er ein søgulig gjøgnumgongd av Føroyum og Føroya søgu. Bókin snýr seg mest um hendingar frá 1912 at rokna, men toyggir seg eisini longur aftur í tíðina. Bókin er skrivað upprunaliga á donskum av Hans Jacob Debes. Bókin hevur eisini sum eitt av sínum fremstu endamálum at kunna danir eins og hinar norðurlendingar um Føroyar og einamest Føroya søgu.

Bókin tekur mong ymisk evni upp, men fylgir tó einari ávísari leið. Arbeiðið við bókini hevur verið ígongd síðani 1994. Tað var Hans Jacob sjálvur, sum tók stig til bókina. Hann hevur síðani tó fingið góða hjálp nógvastaðni frá. Kristian Hvidt og Steen A. Cold hava staðið fyri at geva bókina út. Tað er forlagið Multivers, sum gevur bókina út.

Í sambandi við útgávu varð skipað fyri móttøku í Norðurlandahúsinum leygardagin, har fitt av fólki var savnað. Kristian Hvidt, Steen A. Cold og Henrik Borberg tóku allir til orðanna á samkomuni, og tað var týðuligt, at teir vóru fegnir um útgávuna. Teir nýttu orð sum privilegium at lýsa arbeiðið við hesari bókini.

## Sjálvstýri og Samband

Sum áður nevnt, fylgir bókin einari ávísari leið allan vegin ígjøgnum. Henda leiðin fevnir í veruleikanum um tvey spor: loysing og samband. Tað verður í bókini gjølla greitt frá, hvussu hesi bæði sporini eru gjøgnumgangandi í nýggjari føroyskari søgu, og hvussu ómetaligan stóran týdning hesi hava havt. Bókin ber fram fleiri spurningar í hesum sambandi, og oftani kann tað tykist meira sum undran enn sum svar.

»Disse to spors tydelighed og kraft er denne bogs tema. Deres sammenhæng er skildringens håb.« (bls. 16).

Bókin fer á tveimum sporum ígjøgnum Føroya søgu og føroyska samfelagið. Serliga teir ymsu flokkarnir og tey ymsu fyribrigdini verða tikin fram.

Tað, sum kanska er størsta frámerki við hesari bókini, er, at Hans Jacob Debes hevur havt eitt so vakið eyga við tí føroyska samfelagnum. Gjøgnum hansara kanningar og eygleiðingar kann hann í bókini bera fram ógvuliga gjøllar og fyndugar lýsingar av persónum og hugtøkunum. Á hvørja síðu bókin leggur seg, tað skal lesarin sjálvur sleppa at avgera, men bókin er so avgjørt vera at seta seg við, og tað hevði verið gleðiligt, um eisini ein føroysk útgáva sá dagsins ljós.

## Meget formidlende

Tað er forlagið Multivers, sum gevur bókina út. Frá forlagnum Henrik Borberg komin til Føroya, og hann var sjónliga fegin um hesa nýggju bókina.

Hann greiddi frá, at Hans Jacob flestum kunnugt longu hevur skrivað eina røð av trimum bókum, sum siga frá Føroya søgu, umframt aðrar bøkur sjálvandi. Hann heldur ikki, at hetta er ein samandráttur av teimum trimum, tá ið hesar ikki so nógv koma inn á tíðina, sum verður viðgjørd í bókini, men tað slepst ikki undan, at hanna hevur gjørt sær nakrar royndir við hesum.

Multivers er eitt akademiskt forlag, og teir eru eisini rættiliga fegnir um hesa bókina.

Steen A. Cold, sum var fyrsti stjórin í Norðurlandahúsinum, og Kristian Hvidt hava staðið fyri at fáa bókina út. Steen A. Cold hevur, umframt at vera við til at ritstjórna, eisini verið við til at skriva partarnar av bókini, sum greiða frá teimum ymsu persónum.

Debes er føroyingur við stóra F. Hann hevur eisini síni sjónarmið, men hetta er veruliga ein ógvuliga væl balansera bók, sigur Kristian Hvidt, sum í mong ár hevur verið arkivar á Fólkatinginum.

Sjálvur kundi Hans Jacob Debes ikki vera til staðar, tá ið bók hansara varð løgd fram fyri almenninginum leygardagin. Hans Jacob er sjúkur, og í hansara stað var dóttur hansara komin at taka ímóti einum blómutyssi og heilsanum fyri eitt dygdargott avrik.



*Dóttir Hans Jacob Debes, Súsanna, tók ímóti heilsanum og blómum fyri pápa sín á samkomuni í Norðurlandahúsinum.*






Eldur í sethúsum:

# Gloymdu garnatálgina

**Fríggjakvøldið var eldur í einum húsum í Havn, og skaðin var stórur. Orsøkin til eldin var garnatálg, ið húsfólkið hevði gloymt á komfýrinum**

ELDSBRUNI

*Stefan í Skorini*



*Hesi húsini fóru illa av eldi fríggjakvøldið. Húsfólkið hevði gloymt eina grýtu við garnatálg, ið stóð á komfýrinum*

*MYND: Álvur Haraldsen*

Fríggjakvøldið var eldur í einum sethúsum í Dalagøtu 20 uppi undir Varða í Havn. Boðað varð frá eldsbrunanum klokkan 21.51. Trý korter seinni høvdu sløkkiliðsmenninir tamarhald á støðuni, og ein tíma seinni hevði sløkkiliðið sløkt eldin.

Hann hevði tá elvt til sera stóran skaða á sethúsini. Nakað av skaðanum var beinleiðis av eldinum, men royk- og vatnskaðarnir vóru meira umfatandi og oyðiløgdu ein stóran part av húsinum.

Trý fólk vóru í húsinum, men eingin teirra hevði varnast eina grýtu við garnatálg, ið stóð á komfýrinum og kókaði. Feittið festi í og gjørdi stóran skaða.

Av løgreglustøðini verður sagt, at tað gekk skjótt at sløkkja eldin, og at húsfólkini boðaðu frá eldinum beinanvegin. Tey vóru ikki farin til songar, men vóru framvegis uppi, tá tey varnaðust eldin.

Selmar Joensen og Jenny Lydersen eiga húsini, ið brendu. Óvist er, nær tey kunnu flyta innaftur í tey.

## Rendu í tunnils-veggin

FERÐSLUÓHAPP

*Stefan í Skorini*

Sunnumorgunin var eitt ferðsluóhapp í Leirvíkstunlinum, har førarin var fullur. Tað kundi havt álvarsamar avleiðingar.

Á veg til Leirvíkar missir førarin tamarhaldið á bilinum, sum fer út í tunnilsveggin. Bilurin fekk stóran skaða, men teir báðir menninir sluppu væl frá óhappinum. Førarin sat í trygdarbelti, men hin sat óvardur og endaði á baksetrinum av stoytinum. Bilurin er vrak, so teir vóru hepnir.

Tá løgreglan kom á staðið, vísti tað seg, at førarin, ið er 19 ára gamal, hevði høgt innihald av alkoholi í blóðinum. Hann missir tí óivað koyrikortið.

## Herverk á politibil

HERVERK

*Stefan í Skorini*

Leygarnáttina varð herverk framt móti einum politibili, ið stóð parkeraður í miðbýnum í Havn.

Løgreglumenninir vóru úti, og bilurin stóð óvardur. Ein ungur maður legði á bilin og knústi útryknings-ljósið.

Løgreglumenninir tóku mannin, meðan hann framdi herverkið, og hann kann vænta sær eitt endurgjaldskrav.

# Brúarfoss á Havnina at pumpa sjógv



*Brúarfoss mátti leygardagin leggja inn á Havnina at pumpa sjógv úr skipunum. Ódnarveður var, og skipið hevði fingið ein ógvusligan sjógv*

*Savnsmynd*

SJÓGVUR

*Stefan í Skorini*

Leygardagin kom íslendska farmaskipið Brúarfoss á Havnina. Orsøkin var, at skipið hevði fingið ein stóran sjógv. Nógvur sjógvur var komin í skipið, og tað var neyðugt at pumpa hann úraftur.

Brúarfoss var á veg úr Vestmannaoyggjunum til Immingham í Onglandi. Skipið leggur vanliga ikki at í Føroyum, men leygardagin var tað neyðugt.

Stutt eftir at skipiði hevði lagt frá landi, fekk tað ein øgiligan sjógv, sum hevði við sær, at skipiði fyltist við sjógvi. Rættiligt ódnarveður var har um leiðir um vikuskiftið. Skipið sjálvt fekk tó ongan skaða.

Tað vóru menn frá sløkkiliðnum og skipasmiðjuni í Havn, sum pumpaðu sjógvin úr skipinum. Ravmagnskervið hevði eisini fingið skaða av sjógvinum, og tí komu menn frá Leif Mohr at umvæla ravmagnið.

Brúarfoss kom á Havnina klokkan hálvgum tíggju um morgunin og fór avstaðaftur tólv tímar seinni.

## Tók vørur fyri 600 krónur

STULDUR

*Stefan í Skorini*

Leygardagin varð løgreglan boðsend at koma niðan í Miklagarð í SMS. Ein miðaldrandi maður varð steðgaður av starvsfólki í handlinum, tí hann hevði tikið vørur fyri einar 600 krónur í handlinum.

Løgreglan hevur handtikið mannin, og hann verður skuldsettur fyri stuldur.

## Í fongsul fyri at koyra uttan loyvi

LØGREGLUTÍÐINDI

*Stefan í Skorini*

Fríggjanáttina klokkan trý varð ein 28 ára gamal maður tikin á Strondum. Hann varð tikin fyri at koyra í frádømingartíðini, eftir at hann hevur mist koyrikortið.

Maðurin kann vænta, at hann skal inn at sita fyri hetta brotið á lógina. Hetta er ikki fyrstu ferð, at løgreglan tekur viðkomandi í frádømingartíðini, og tí skal hann í fongsul. Maðurin var einsamallur í bilinum.

